# Seyðisfjørður, okkara grannabýur

**Seyðisfjørðurin kann saktans roknast fyri at vera okkara heimabeiti. Hann er nærmasti býur vit kunnu røkka við ferðamannaskipi úr Føroyum. Siglingin tekur bert 18 tímar, ein stórur partur er um náttina. Hin tíðin merkist ikki**



*Her síggja vit ein part av ferðalagnum avmyndað á Skálanesi. Nummar 3 frá vinstru í fremsta raði stendur Jónas Halgrímsson*

Tó kann ikki sigast, at Seyðisfjørður er nakar heimsbýur. Har búgva bert eini 800 fólk. Býurin er merktur av útlendskari ávirkan. Her vóru nógvir danskir og norskir handilsmenn frá miðjuni av 19. øld. Hetta hevur eisini merkt byggiháttin í býnum, tá menn fóru at innflyta liðug norsk hús.

Serliga var tað sildavinnan árini 1870-1900, sum kom at seta sína ávirkan á býin. Tá fór býurin rættuliga at vaksa, og hann fekk býarheitið í 1895.

Tað koma nógv ferðafólk til Seyðisfjarðar, og er hetta fyrst og fremst takkað verið Norrønu. Fólkið hjá Smyril Line gjørdi eisini sítt til at gera hendan túrin so væleydnaðan. Her var fyrst og fremst talan um Jónas Hallgrimsson, sum sera væl dugdi at leggja skránna. Hann var eisini við ein part av ferðini. Hetta eigur hann tøkk fyri. Jónas er væl kendur í Føroyum sum fyrrverandi nevndarlimur í Smyril Line.

Móttøkan var eisini góð. Borgmeistarin á Seyðisfirði Ólafur Sigurðsson bjóðaði ferðalagnum vælkomið, har hann legði dent á sambandið millum Føroyar og Ísland og ikki minst Seyðisfjørðin.

Føroyingar eru nevniliga allar tíðir komnir til Seyðisfjarðar. Skipini sum fiskaðu á Eysturlandinum komu inn higar. Ofta var tað fyri at halda sunnudag. Aðrar tíðir var tað fyri at kroka.

Men so var tað eisini útróðurin til lands. Summir útróðrarmenn høvdu støð inni í Seyðisfjørðinum. Aðrir vóru úti við munnan. Á norðara armi vóru teir á Brimnesi, sum nú er avtoftað, men har tað eru toftir, sum minna um gamla tíð. Her er vist nakað ringt at koma til, men tað er kortini møguligt. Hetta var stóra útróðrarplássið hjá føroyingum.

Á sunnari armi á Seyðisfjørðinum, sum er 10 fjórðingar djúpur, er tað Skálanes, har tað enn er ein garður, og har vit vitjaðu. Her kundi eisini síggjast, hvar føroyingar høvdu búleikast. Her var ringt at koma til, men tað er tó koyrandi.

Millum Seyðisfjørðin og Skálanes er Hánefsstaðir, har eisini varð róð út. Millum teir sum róðu út her var í hvussu er Andrass í Pállstovu av Eiði. Hann varð umrøddur í Miðvikuni í frásøgn hjá abbasoni hansara Tórhalli Andreassen.

Ein annar abbasonur Tummas Andreassen var eisini við á hesum túrinum. Andrass hevur so eisini verið á Skálanesi og Brimnesi.

## Eisini áhugi fyri søguni í Íslandi

Alt hetta er felags søga hjá íslendingum og føroyingum. Áhugin fyri henni er stórur í Føroyum. Millum annað kom hetta til sjóndar í hesi ferðini. Sjálvur havi eg gjørt rættuliga nógv fyri at fáa hesa søgu á prent fyrst í FF-blaðnum og seinni í Sosialinum. Hetta hevur víst seg at hava stóran áhuga millum fólk.

Men áhugin er eisini stórur í Íslandi. Hetta sást eisini á hesi ferðini. Komið varð á Seyðisfirði í samband við Rannveig Thórhallsdóttir, sum er við í eini verkætlan at kanna søguna hjá norðmonnum og íslendingum í samband við útróður til lands á eysturlandinum.

Vit hava avtalað samstarv. Hon fekk tað tilfar, eg hevði við til Íslands og eg havi frá henni fingið samrøðu, sum hon í Íslandi hevur havt við føroyska konu um lívið hjá pápanum, sum var væl kendur á hesum leiðum.

Á Seyðisfirði er eisini Fjarðarsel, sum er millum tey elstu vatnravmagnsverk í Norðanlondum. Tað er bygt í 1913 og er enn virkið. Har er eisini eitt museum, sum tað ber til at vitja. Sagt varð á Seyðisfirði, at hetta verk fyri ein stóran part varð fíggjað av peningi, sum føroyskir útróðrarmenn løgdu til býin.

## Ferð verður aftur

Tað eru nógv, sum hava sagt frá, at tey fegin høvdu viljað verið á hesum túrinum til Íslands. Men hetta kom so mikið seint í lag, at fólk høvdu lagt aðrar ætlanir. Kortini var fullsett.

Men møguleiki verður aftur komandi ár. Smyril Line hevur longu lagt ætlan um ein líknandi



*Føroyingar róðu eisini út á Skálanesi*

túr og um ein vikutúr, har tað verður betri tíð, og møguleiki verður at síggja meira av slóðunum hjá føroyskum fiskimonnum. Hetta verður lýst nærri

## Ódnin 20. september 1900

Føroyingar eru komnir til Seyðisfjarðar í meira enn 100 ár. Ein av teimum, sum fekk niðurskrivað heilt væl av føroyskari fiskimannasøgu var Erling Poulsen, lærari í Vági, sum doyði fyri nøkrum árum síðani. Erling var ein dyggur stuðul hjá FF-blaðnum, og fekk blaðið eina ferð frásøgn frá honum um eitt tiltikið ódnarveður 20. september 1900.

Hetta hevur verið um javndøgurstíð, og javndøgursstormar hava altíð verið tiltiknir. Seinni royndu skipini altíð at vera heimkomin áðrenn hesa tíðina. Men hesin stormur í 1900 kostaði tveimum føroyskum fiskimonnum lívið. Her er ein partur av frásøgnini hjá Erling.

Ár 1900 var eitt ræðuligt ódnarveður um heystíð, nevniliga tann 20. september. Abbi mín var við skipi, ið var statt millum Ísland og Føroyar í hesari ódnini, og eg hoyrdi hann so mangan taka til, at verri veður enn tá var kundi ikki blíva aftur.

## Royndin Fríða

Í hesum ódnarveðrinum fóru tvey føroysk skip á land á Seyðisfirði og blivu